Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

planet.fo




# Ósemja ímillum FUTT og G!

FUTT í Býin og G! Festivalurin hava lagt seg á sama vikuskifti í summar. Fyrireikararnir eru ikki samdir um, hvør skal bakka G! Festivalurin og FUTT í Býin hava lagt seg á sama vikuskifti í summar. Hóast G! áður hevur verið eitt vikuskifti fyrr, so hava fyrireikarar tikið stig til, at G! Festivalurin skal verða eina viku seinni enn vanligt. G! plagar at verða 3. vikuskiftið í Juli, men av tí at nýggi festivalurin, Festivalurin við Múrin, hevur lagt seg á hetta vikuskiftið, so hevur G! avgjørt at leggja seg á 4. vikuskiftið í Juli.
Hetta hevur FUTT í Býin, festivalurin í Tórshavn, eisini havt ætlanir um, men nú letur til, at Havnin hevur bakkað fyri Gøtu.
- Eg fekk at vita frá FUTT fyrireikarunum í gjár, at tey ætla at flyta teirra festival til 27. juli, og tað halda vit tænir báðum pørtum væl, sigur Jón Tyril, fyriskipari av G! Festivalinum

Men fyrireikararnir av FUTT hava eina aðra støðu til málið.
- Vit hava ikki enn avgjørt um vit ætla at flyta FUTT í Býin ella ikki, sigur Jóhannes á Rógvu, fyriskipari.

Enn er ikki greitt um G! Festivalurin og FUTT í Býin verða sama vikuskifti, ella um semja fæst um málið áðrenn.

# Ófatiliga vánalig X-Factor fløga!

- Tónleika marknaðurin heldur eftir øllum at døma, at tað er neyðugt at mjólka hvønn gullkálvið ein kann finna fram. Soleiðis siga ummælarar hjá ekstrabladet.dk um X-Factor

Nú skulu børnini í Kongaríkinum eisini plága teirra foreldur fyri at fáa fingrarnir í eina "discount" vøru, sum inniheldur eitt ella fleiri innsløg frá teimum meira ella minni talentleysu nýggju finalistunum í ársins X-Fator kapping.

Samlað við rópunum hjá áskoðarafjøldini og tónaleysum tulkingum av øllum frá landaplágum til evergreens í liveútgávum, ið eru skerdar niður til 2 minuttir, so at hyggjararnir í ótolni ikki skifta yvir á BBC.

At geva 149 krónur fyri hesar útgávurnar, ið eru ein niðran av upprunaskøldum sum the Bee Gees, svarar til at gjalda 495 krónur fyri ein tilvildarligan umgang av amatør fótbólti millum hundalortarnar í Kløvemarken, tá ein kann gjalda tað sama fyri ein túr í Parken og síggja ein dyst ímillum Danmark og Svøriki.

Soleiðis sigur ummælarin hjá Ekstra Blaðnum um nýggju X-Factor fløguna.

**Hetta halda ummælarar í Danmark um Lindu og hinar luttakararnir í X-Factor**

1. **Asian Sensation**
   *- Ikki júst teir tríggir Tenorarnir, men hvør kann lata verða við at smílast ?*
2. **Mohamed.**
   *- Timing sum ein tikari. Tann loyniligi sætti limurin í The Jackson 5*
3. **Sidsel**
   *- Ein sær ein skroypiliga sál, ið allarhelst verður kroyst í miðla mylluni.*
4. **Linda.**
   *- Celine Kyrkjebø. Hevur eina vakra rødd*
5. **Claus.**
   *- Yvirlærari í fittaskúlanum. Ansin anonymitetur og takksamt einki.*
6. **Alien Beat Club.**
   *- Kynsleyur dansur í ungdómsklubbanum. Einkisigandi tvass.*